Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Helgi Abrahamsen, løgtingsmaður

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Búskapargrunnurin

Spurningar:

1. Vórðu fleiri pengar fluttir í Búskapargrunn Føroya í 2022 enn tað, sum lógin kravdi?
2. Eru fleiri pengar fluttir í Búskapargrunn Føroya í 2023 enn tað, sum lógin krevur?
3. Hava undanfarin landsstýri goldið minni inn í Búskapargrunn Føroya enn tað, sum lógin kravdi?

Viðmerkingar:
Tann 30. september í ár setti undirritaði Ruth Vang, landsstýriskvinnu, ein § 52a fyrispurning, sum varð svaraður tann 11. oktober. Tíverri sær út til, at fleiri av spurningunum ikki verða svaraðir í svarskrivinum, og tí royni eg aftur at fáa hesar spurningarnar svaraðar.

Fyrispurningurin snýr seg ikki um, hvussu landsstýrið ætlar at broyta lógina um Búskapargrunn, men um tað, sum higartil hevur verið framt í verki.

Orsøkin til fyrispurningin er eitt lesarabræv hjá Høgna Hoydal, varaløgmanni, tann 18. september í ár, har hann sigur, at núverandi samgonga, sum tann fyrsta, hevur valt at lata inntøkur av tilfeingisgjøldum og aligjøldum fara beinleiðis í Búskapargrunnin, og at hesi tí ikki síggjast á fíggjarlógini. Hann samanbar hetta við undanfarin landsstýri, sum, sambært honum, heldur valdu at brúka allar inntøkurnar.

Mín spurningur er, um tað er rætt, sum varaløgmaður sigur – at undanfarin landsstýri hava brúkt allar inntøkurnar, og tí ikki hava goldið tilfeingisgjøldini í Búskapargrunnin, soleiðis sum lógin krevur, og um sitandi landsstýri hevur goldið meira inn í Búskapargrunnin (ikki í framtíðini, men higartil) enn tað, sum lógin krevur.

Á Løgtingi, 14. oktober 2024

Helgi Abrahamsen